# Liverpool-fjepparar hittast í Klaksvík

Komandi leygarkvøld verður skipað fyri Liverpool-treffi í Klaksvík.

Tað eru Liverpool-viðhaldsfólk, sum hava tikið stig til tiltakið, sum verður hildið í kantinuni á Føroya Bjór.

Liverpool hevur farna árið fingið góð úrslit í heimligum og europeiskum kappingum, og fimm steyp eru fingin til høldar inn stutta tíð.

Hetta halda fyrireikararnir av Liverpool-treffinum gevur grundlag fyri, at viðhaldfólk hjá The Reds kunnu hittast og fegnast um góðu úrslitini.

Borðreitt verður við smyrjibreði og onkrum góðum afturvið leygarkvøldið. Omaná verður kaffi. Tey, sum eiga myndir ella annað við tilknýti til Liverpool, kunnu taka hetta við.

Krøv fyri luttøku eru, at tú ert avgjørdur Liverpool-viðhaldsfólk, at tú ert ílætin okkurt Liverpool-plagg, og at tú ert í minsta lagi 20 ára gamal.

Tiltakið kostar 150 krónur, og gjaldast skal við inngongdina. Tilmelding kann gerast hjá Svend á tlf. 211904 ella hjá Hákun á 215665.

*-ek*

# Nygaard skoraði

**Roda tykist hava fingið gott tak á íslendska Fylkir, sum hevur lítlar og ongar møguleikar at halda fram í UEFA Cup**

HOLLAND
*Jóannes Hansen*

Hóast døpru tíðindini eftir stóra skelkin í USA týskvøldið, so spældu teir altjóða fótbólt í Europa, um enn tað ikki varð gjørt so nógv burturúr, sum tað plagar at verða gjørt.

Ein av dystunum var tann í Roda í Hollandi. Roda og hálvi føroyingurin og danski landsliðsspælarin, Marc Nygaard, var við í álopinum hjá Roda, sum hevði vitjan av Fylkir í Reykjavík.

Hollendska liðið vann 3–0. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað er heilt nógv, sum bendir á, at dysturin á Laugardalsvøllinum um fjúrtan dagar verður ein avgreiðsluspurningur.

Roda var væl betri fyri enn íslendsku gestirnir, og í 1. hálvleiki fingu teir eitt mál. Tað skoraði Marc Nygaard í 23. minutti. Í 2. hálvleiki øktu teir tvær ferðir.




# Royndust væl í Danmark

*Dánial Jákup Djurhuus og Unn Mortensen tóku um vikuskiftið lut í Danish Open kappingini í boccia*



**Føroyskir boccialeikarar tóku um vikuskiftið lut í stóru kappingini, Danish Open 2001**

BOCCIA
*Jákup Mørk*

Um vikuskiftið sendu ÍSB og Tórshavnar kvøld- og ungdómsskúli tveir boccialeikarar av landinum. Danish Open 2001 var á skránni. Kappingin var í Struer, og fleiri hundrað ítróttafólk høvdu leitað sær til Jútlands hesar dagarnara, sum kappast varð.

Unn Mortensn úr Havn leikti í bólti fyri menningartarnað. Unn kom illa frá byrjan, og leygardagin gekst illa í hon. Sunnudagin var tó annað lag á. Unn hevði nú tikið annað skinn um bak, og vann hon fleiri dystir upp í slag. Hon endaði sostatt á triðja plássinum í bólki sínum, og hóast hetta ikki var nóg mikið til at røkka endaspælinum, so bar góði sunnudagurin boð um, at evnini til boccia eru góð.

Ungi strandingurin, Dánial Jákup Djurhuus, sum er rørslutarnaður, fekk royndan. Dánial Jákup hevur innan heilt stutta tíð gjørt rættiliga vart við seg í heimligu kappingunum, og varð hann tí bólkaður saman við stinnastu leikarunum í Danmark. Her eydnaðist tað honum at vinna ein dyst, og í fleiri øðrum dystum sýndi hann heilt gott spæl, veðru sagt í tíðindaskrivi frá ÍSB.

Mariann Øster, landsliðsvenjari, og Aleth Djurhuus, hjálparfólkm vóru eisini við á Danmarkarferðini.

# Todi missir makkaran

**FCK stendur í boði at fáa 72 milliónir fyri Zuma, og so ætla teir at brúka ein part av pengunum at keypa nýggjan álopsspælara fyri**

SUPERLIGA
*Jóannes Hansen*

Í kvøld klokkan fimm minuttir í átta skal FCK aftur í europeiska eldin. Á heimavøllinum í Parkini í Keypmannahavn, har teir fyri einum góðum mánað síðani vunnu á Lazio í innleiðandi umfarinum í meistarakappingini, fáa teir vitjan av Obilic. Talan er um jugoslaviska høvuðsstaðarliðið, sum kom víðari í kappingini, tá teir gjørdu av við GÍ. Dysturin millum FCK og Obilic verður at síggja á TV3+ rásini.

Todi Jónsson er í FCK hópinum. Hóast hann ikki skoraði, tá FCK sunnudagin hevði vitjan av OB, so man tað vera rættuliga stórt sannlíki fyri, at Todi verður ímillum teir fyrstu ellivu. Fyribils venjarin, Niels Christian Holmstrøm, tykist hava stórt álit á føroyska spælaranum.

## Zuma nógv umbiðin

Stóri spurningurin í FCK er, nær Zuma verður seldur. Tað er so mikið stórur gravgangur eftir suðurafrikanska álopsessinum, at tað ikki er ein spurningur, um hann verður seldur, men heldur nær hann verður seldur.

Suma fer at spæla við í Parkini í kvøld. Men tað er sera ivasamt, um hann verður í ferðalagnum, tá FCK 27. september fer at spæla í Beograd.

Sambært donsku fjølmiðlarnar 34 europeisk feløg givið til kennar, at tey eru áhugað í at keypa Zuma. Eingilsku bløðini, The Sun og The Mirror, vita at siga, at nú er prísurin komin upp á 72 milliónir krónur. Tað sigst, at Sunderland og Middlesbrough, sum bæði eru í bestu deildini, eru sinnað at rinda FCK henda prísin fyri at fáa fatur á myrka gullfuglinum.

## Georgiari í plássið

Maður kemur í mans stað, plagar at vera sagt. Ikki minst í fótbólti er nakað í hesum. Í FCK ætla teir ikki, at tað bert skulu vera Todi Jónsson, Heine Fernandez, Carsten Fredgaard og kanska onkur annar, sum kappast um álopsplássini.

Fyrrapartin í vikuni ljóðaði, at tað er rættuliga sannlíkt, at FCK fer at keypa besta álopsspælaran í Georgia. Hann eitur Mikhail Ashvetia. Teir í FCK fingu eyga á hann, tá teir spældu ímóti Torpedo Kutaisi í innleiðandi umfarinum í europeisku meistarakappingini. Dysturin í Georgia endaði 1–1, og tað var hesin maðurin, sum javnaði fyri heimaliðið.

Tað sigst, at georgiska felagið vil hava einar ellivu milliónir fyri hann. FCK eigur væl og virðiliga fyri nýggja álopsmannin, sum var í Parkini og hugdi at, tá FCK og OB sunnudagin spældu 1–1, men teir ætla sær ikki at rinda so nógv. Tað verður roknað við, at tað fer at bera til at fáa prísin næstan niður í helvt. Felagið hjá honum hevur í hesum kappingarárinum spælt fimm dystir, og Mikhail Ashvetia hevur skorað átta mál. So tað kann ikki sigast annað, enn at hann er málsøkin.



